## Heðin Askham:

# Ein treyt at vit vinna

**UPPTAKT** Seinasti dysturin í 9. umfari í Vodafone deildini verður leiktur í kvøld. Við Margáir tekur EB/Streymur ímóti B68. Liðini liggja á ávikavist sætta og sjeynda plássi, men tað er ikki langt upp til oddin



**SIGURSTREYT**

*Tað er ein treyt hjá okkum at vinna dystin í kvøld, um vit ynskja at vera partur av betra endanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen, savnsmynd*

Tróndur Arge

– Um vit skulu verða ein partur av betra endanum, so er tað ein treyt at vit vinna í kvøld. B68 er eitt gott lið, sum hevur svinga eitt sindur í ár, men tá tað gongur væl hjá teimum, so eru teir sera sterkir, sigur Heðin Askham, venjari hjá EB/Streymi.

EB/Streymur spældi hósdagin í Gundadali ímóti B36 í fyrru hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið.

– Eg trúgvi ikki at tað kemur at hava tann stóra týdningin. Vit hava havt ein dag longri at hvílt enn hini liðini sum spældu hálvfinalur og vit hava eisini hvílt nógv, sigur Heðin um ávirkanina, ið hálvfinalan kann fáa á dystin í kvøld.

Tað hevur gingið illa hjá B68 seinastu tríggjar dystirnar. Tað hava tapt fyri HB og NSÍ og fingu bara javnt á heimavølli ímóti argjamonnum.

– Vit hava fingið fleiri skaðar í seinastuni. Eitt nú Ndende, sum ein tann týdningarmiklasti spælarin hjá okkum, men vit hava eisini havt tvey leikbann og smáskaðar. Tað spælir alt inn, sigur Bill M. Jacobsen, venjari hjá B68.

B68 liggur á sjeynda plássi við 10 stigum, sum er eitt færri enn mótstøðuliðið í dag, EB/Streymur.

– Vit gera sum vit gjørdu ímóti eitt nú HB í Gundadali og ímóti Víkingi á Toftum. Tá valdu vit at spæla við tveimum framherjum og tveimum ágangandi vengrum. Vit skoraðu trý mál í Gundadali, men tað var tíverri ikki nokk. Tað plagar at verða spennandi tá vit spæla og tað verður tað aftur í kvøld, sigur Bill M. Jacobsen

trondur@sosialurin.fo

# KÍ beina kós móti gullinum

**1. DEILD KVINNUR** KÍ kvinnurnar eru ikki til at steðga í ár. Tað er niðurstøðan eftir at KÍ í gjár vann odda dystin á Argjum 3-1. Hóast AB hevði bóltin meir enn KÍ, so tóktist gestirnar at hava tamarhald á dystinum. Í Gøtu eydnaðist EB/Streymi at fáa eitt stig heim við, meðan Skála vann trygt á MB

Tróndur Arge

Tað skuldi verða dysturin har AB kvinnurnar meldaðu seg í FM stríðið aftur, men endaði við at blíva ein staðfesting av at KÍ eru einaráðandi í kvinnu fótbólti í ár. AB byrjaði dystin betri og høvdu bóltin nógv, men megnaðu ikki at skapa teir stout møguleikarnir. Í staðin gjørdi KÍ skjót av tá AB gjørdi eina verjuvillu. Rannvá B. Andreassen fór strúkandi avstað og legði KÍ á odda.

Eftir málið hevði AB sítt besta tíðarskeið í dystinum. Tær skapu fleiri vandastøður og tað var uppiborið tá Lisa í Liða javnaði fyri vertirnar. Í seinasta sparkinum í fyrra hálvleiki slóð KÍ til aftur. Una Joensen smekkaði bóltin í málið umvegis tvørstongina. Í seinna hálvleiki megnaði AB ongantíð at hótta KÍ, sum miðskeiðis í seinna hálvleiki økti um leiðsluna til 3-1.

Tað kom eitt sindur av spenningi í dystin, tá dómarin í eini hornasparksstøðu valdi at geva KÍ málverjanum, Randi Wardum, reytt kort og brotsspark til AB. Tvímálskjúttin hjá KÍ, Rannvá B. Andreassen, tók handskarnar uppá og fór í mál. Tvíverri fyri AB brendi Olga Kristina Hansen brotssparkið, ið endaði á stongini. Løtu seinni bríkslaði dómarin av og KÍ hevur á triðja sinni vunnið á AB í ár og liggur seks stig framman fyri AB, ið hevur leikt ein dyst fleiri.

trondur@sosialurin.fo

# 07 Vestur og TB framvegis á uppflytingarkós



*Mynd: savnsmynd*

**1. DEILD MENN** Oddaliðini í 1. deild hjá monnum vunnu øll sínar dystir leygardagin

Jonhard Hammer

Tað var einki at rafla um, tá ið oddaliðið í næstbestu fótbóltsdeildini, 07 Vestur, seinnapartin leygardagin vitjaði botnliðið, B68 á Svangaskarði. 07 Vestur vann heili 7-1, og harvið eru vágamenn framvegis oddalið og harvið besta boðið upp á uppflyting. B68 helt tørn í ein hálvan tíma, men so gekk skjótt, tí 07 Vestur skoraði trý mál í átta minuttir. Málskjúttar vóru Jovan Panic, Holgar Djurhuus og Henning Joensen. Eitt lítið korter eftir hvíldina skoraði 07 Vestur aftur, og níggju minuttir seinni var støðan 7-0! Málskjúttar hjá 07 Vestur í 2. hálvleiki vóru Jovan Panic, Jens Erik Rasmussen, Holgar Djurhuus og Henning Joensen.

Tá ið tað restaðu tólv minuttir pyntaði Andrias Højgaard um fyri B68 so úrslitið gjørdist 7-1 til 07 Vestur.

### TB vann á FC Hoyvík

TB er framvegis á uppflytingarkós. Leygardagin vann aldursforsetin í føroyskum fótbólti 2-1 á FC Hoyvík á niðara vølli í Gundadali. Hálvleiksstøðan var 1-0 til TB. Heimaliðið legði bragdliga fyri, men tað vóru gestirnir av Tvøroyri, sum eftir eitt korter legði seg á odda. Málskjútti var Bárður Dimon, sum var púra leysur undir málinum, eftir at hornaspark varð sent innfyri. Tíggju minuttir eftir hvíldina økti TB um leiðsluna, og aftur hesa ferð var tað eftir hornaspark. Málskjútti var Dan Mortensen, sum stýrdi innlegginum í málið.

Tíggju minuttir undan leikloki minkaði heimaliðið um munin. Málskjútti var Sunnleif J. Midjord, sum eftir innlegg var leysur undir málinum. Síðstu løtuna trýsti heimaliðið nógv fyri at vinna í hvussu so er eitt stig, men tað eydnaðist ikki at skora, og harvið vann TB 2-1.

### KÍ aftur á slóðina

Tað var akkurát fyri og ikki nógv meiri enn tað, tá ið KÍ seinnapartin vitjaði við Løkin í Runavík. KÍ vann 2-0, eftir at hálvleiksstøðan hevði verið 1-0. Miðverjin Sørmund Kallsø stútaði eftir hornaspark fyrra málið í 1. hálvleiki, og tá ið tað restaði ein lítil løta staðfesti álopsspælarin Bárður Heinesen sigurin við rimmar langskoti. Í seinna hálvleiki hevði heimaliðið hug at leggja trýst á. Teir gulu høvdu fleiri hornaspørk, uttan at tað stóðust rættuliga vandamiklar støður burturúr. Rættiligt kortrok var í góðveðrinum við Løkin. Per Langgaard hjá heimaliðnum sá reytt í 88. minutti, eftir at hann innanfyri ein minutt tvær ferðir hevði sæð gula kortið. Seks klaksvíkingar vórðu skrivaðir upp í bókina hjá dómaranum, og eisini Óli Hansen hjá NSÍ sá gult.

### HB er við enn

Tað hevur gingið væl hjá næstbesta HB liðnum, sum hevur verið á heiðursmerkjaplássi, og aftur í dag hilnaðist tað væl. HB vitjaði á Argjum, og havnarmenn fóru heim um aftur ánna við fullari úrtøku. Málini vórðu skorað eftir tíggju minuttum seint í fyrra hálvleiki.

Málskjúttar vóru Bárður Mortansson í 28. minutti og Johan Ejvind Mouritsen í 39. minutti. Teir næstbestu hjá EB/Streymi vunnu 2-1 á Víkingi á útivølli. Øll málini fullu í fyrra hálvleiki. Jan Poulsen legði Víking á odda, men Teitur Joensen syrgdi við tveimum málum fyri, at EB/Streymur fekk øll tey trý stigini.

jonhard@sosialurin.fo